# Tá Strandferðslan flutti suður ...

**Fríggjadagin var almenn móttøka á Strandferðsluni í sambandi við, at stovnurin nú er fluttur og virkar á Tvøroyri**



*Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður og nývaldur løgtingslimur, heilsar upp á virkandi stjóran á Strandferðsluni, Jákup Danielsen*



*Kristin Vestergaard, borgarstjóri á Tvøroyri, var sjálvandi eisini hjástaddur og segði nøkur orð*



*Borgarstjórin í Hovi, Delmar Tausen, starvsfelagi hansara í Sumba, Niclas Hentze, Jákup Danielsen, strandferðslustjóri, og Jóannes Eidesgaard, løgmaður*




*Kristel Lisberg sang á móttøkuni*



*Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, Arni Nielsen, bygdaráðslimur í Fámjin, Kári á Rógvi, nývaldur tinglimur fyri Sjálvstýrisflokkin, navnabróðir hansara, Kári P. Højgaard, floksformaður, og Heðin Zachariassen, á seinasta arbeiðsdegi sínum sum landsstýrismaður*



*Løgmaður heilsar upp á Jógvan Amonsson, grannskoðari, og Jens Johannesen, býráðslimur á Tvøroyri*



*Arni Nielsen, bygdaráðslimur í Fámjin, Hans í Líðini, býráðslimur í Vági, Jens Petur Brattalíð, Strandferðslan, og Jóhan Dahl, løgtingsmaður*

# Skiparar heiðraðir

**Á móttøkuni á Strandferðsluni fríggjadagin vórðu skiparar heiðraðir**

STRANDFERÐSLAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jákup Danielsen, virkandi stjóri á Strandferðsluni, tók við móttøku á Strandferðsluni fríggjadagin heldur skemtiliga til nakað soleiðis, at skiparar á Smyrli høvdu vit hoyrt eitt sindur um síðstu tíðina, men at hann fór hóast hetta at siga eitt sindur um teir.

Hanus Lassen og Pauli Larsen, skiparar á Smyrli, fara báðir um tey 67 árini, og røkka pensjónsaldri, men við nýggjari lógarbroyting kunnu teir halda á í starvi nøkur ár afturat. Teir býta nú eitt skiparastarv sínamillum.

Hanus Lassen hevur í mong ár røkt starv sum skipari á Smyrli, í yvir 30 ár, segði Strandferðslustjórin. Pauli Larsen hevur somuleiðis verið skipari í mong ár og hann kom umborð á Smyril í 1988. Strandferðslustjórin rópti teir báðar fram, og Jan Haldansen, leiðari á Sjódeildini, handaði teimum gávu og takkaði fyri trúgva og drúgva tænastu



*Jan Haldansen, Strandferðslan, Jákup Danielsen, virkandi strandferðslustjóri, Hanus Lassen og Pauli Larsen, skiparar á Smyrli*

*Mynd; D. Olsen*